## DAGSINS MEINING

# Karsten Hansen og tann sokallaði skattalættin

Samgongan hevur lovað ein skattalætta. Hvat er endamálið við einum skattalætta? Samgongan hevur sagt, at hon vil lætta um hjá borgarnum við einum skattalætta, so at tað skal gerast meira hugaligt at arbeiða. Hesum endamáli kunnu øll ivaleyst taka undir við. Hvat ger so Karsten Hansen?

Hann boðar frá, at skattalættin skal figgjast við afturhaldi í lønum og øktum avgjaldsbyrðum á arbeiðsmarknaðinum. Hann ætlar sær við øðrum orðum at geva við einari hond fyri at taka tað sama aftur við hinari hondini. Er tað løgið, at okkara umsiting er vorðin ov dýr? Tað er stórt spill av skattgjaldarans peningi, um man skal brúka tíð og pengar úti í Fíggjarmálastýrinum fyri at uppfinna ein skipan, ið skal innkrevja tað sama, ið man letur í skattalætta.

Hví sigur Karsten Hansen ikki bara sum er? Tað er ikki ráð til at lata skattalætta í løtuni. Nú síggja vit, hvat gyltu lyftini vóru verd um, at blokkurin kundi skerast niður við næstan 400 milliónum uttan at tað skuldi merkjast. Man segði seg enntá hava ráð til blokkniðurskurð og skattalætta! Nú síggja vit, at veljarin, sum ikki einaferð, er drigin uppá tráð í hesum máli.

Vit hava eina fíggjarlóg, ið ikki hongur saman, og tosað verður um fleiri hundrað milliónir í almennum sparingum. Hetta er einki nýtt. Andstøðan ávaraði trúliga móti stóra blokkniðurskurðinum, men samgongan var hvørki til at høgga ella stinga í. Serliga tyktist Tjóðveldisflokkurin verða heilt immunur yvirfyri væl grundaðari búskaparligari argumentatión frá andstøðuni, og úrslitið síggja vit í dag. Og so tosa teir entá um at fremja fleiri skerjingar í blokkinum skjótast.

Hvønn skaða hevði tað gjørt, um Tjóðveldisflokkurin hevði tikið undir við einum blokkniðurskurði uppá 100 milliónir, soleiðis sum Javnaðarflokkurin skeyt upp? Tað hevði verið ein nógv hóvligari gongd, og so sat man ikki við einari slíkari mangulfullari fíggjarlóg i dag. Eitt er vist, og tað er, at føroyskt sjálvbjargni er sett nógv ár aftur í tíðina vegna forstokkutheit og manglandi búskaparligari jørðkontakt.

Tað hevur ikki skortað uppá ávaringar frá kvalificeraðum fólki, men tiverri hevur tað víst seg, at allur konstruktivur kritikkur hevur verið kveistraður burtur við ákærum um "svart omaná svart" og "partapolitiskum tvassaríi". Gamla orðatakið sigur, at skjótt er skitið verk, og tað mugu vit og ikki minst Karsten Hansen ásanna í dag.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fyrispurningur til Høgna Hoydal, landsstýrismann

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður*



**Løgtingsmál nr. 100-20/ 2002: Viðvíkjandi lógini um viðgerð av persóns - upplýsingum**

1. Hvørji saklig atlit í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum metir landsstýrismaðurin seg hava, tá hann við nýggjari kunngerð ætlar at stegða Elektron í at samskifta við danskan tænastustovn?

2. Í hvønn mun metir landsstýrismaðurin, at lóggávan á teimum økjum, ið snúgva seg um viðgerð av persónsupplýsingum, ger rættarstøðuna hjá persónum verri í Danmark enn í Føroyum?

3. Hevur landsstýrismaðurin fingið viðmæli frá fyrisitingini til at gera nýggja kunngerð um flutning av persónsupplýsingum til útlond? og um so er, hvussu eru grundgevingarnar í viðmælinum?

4. Í hvønn mun forðar handilssáttmálin millum Føroyar op ES, at landsstýrismaðurin tekur atlit til, at føroyskar teldufyritøkur fáa handilsliga serstøðu í mun til ES-fyritøkur, og at EDV-førleiki verður varðveittur í Føroyum?

5. Hvørjar tankar hevur landsstýrismaðurin gjørt sær, um møguligt rættarmál verður avleiðing av fráboðaðu kunngerðini?

6. Hvørjar avleiðingar, metir landsstýrismaðurin, at fráboðaða kunngerðin kann hava fyri tær gjaldstænastur, ið føroyingum stendur í boði í dag?

**Viðmerkingar**

Drúgt orðaskifti hevur verið í fjølmiðlunum, síðan Elektron fyrr í ár søkti Dátueftirlitið um loyvi til at nýta donsku gjaldskipanina PBS, ið føroysku peningastovnarnir eru partaeigarar í, til at veita okkum betri gjaldstænastur. Aftaná fyrst at nokta fyri hesum møguleika, broytti Dátueftirlitið støðu og gav Elektron neyðuga loyvi.

Orðaskifti hevur serliga verið millum teir, ið varða av Elektron øðrumegin og landsstýrismannin í lógamálum hinumegin. Elektron heldur uppá, at lógin um viðgerð av persónsupplýsingum loyvir teirra samstarvsvirksemi við danska tænastustovnin PBS, og at hetta sambært Dátueftirlitinum er loyvt. Landsstýrismaðurin metir ikki, at lógin heimilar slíkum virksemi, og hann hevur í sínari argumentasjón serliga víst til álitið, ið rættarnevndin læt Løgtinginum, tá lógin var til viðgerðar og var samtykt í Løgtinginum á vári 2001. Niðurstøðan hjá landsstýrismanninum er, at tað er Løgtingsins vilji, at slíkar upplýsingar, ið talan er um, ikki skulu av landinum, og at hann vil gera tað, ið er neyðugt fyri at steðga hesum virkseminum hjá Elektron. Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann ætlar at koma við nýggjari kunngerð, ið ger hetta púra greitt.

Sum ein av teimun, ið var við til at samtykkja lógina um viðgerð av persónsupplýsingum, vil eg við hesum boða landsstýrismanninum frá, at hann ikki umboðar mín vilja í hesum máli.

Eftir mínum tykki loyvir lógin, at upplýsingar kunnu flytast av landinum, um tað er sannlíkt, at lóggávan, í hesum førinum í Danmark, verjir einstaklingin líka væl sum føroysk lóggáva. Eg eri sannførdur um, at tað neyvan finst ein saklig grundgeving fyri at halda, at donsk lóggáva ikki tryggjar borgaran líka væl ella betur enn okkara egna lóggáva, tá talan er um at tryggja borgaran, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar.

Endamálsorðingin í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum er soljóðandi "§ 1. Lógin hevur til endamáls at tryggja persónsvernd hins einstaka, tá persónsupplýsingar verða viðgjørdar, soleiðis at persónsupplýsingar verða viðgjørdar við virðing fyri tí persónliga frælsinum og heimafriðinum og grundað á persónsupplýsingar við høgari góðsku."

Høvuðsendamálið við lógini er sostatt, at tryggja persónsvernd hins einstaka, og er hetta tí einasta sakliga atlitið, ið landsstýrismaðurin eigur at taka, tá støða skal takast til, hvat ið sambært lógini er loyvt ella ikki.

Er grundgevingin hjá landsstýrismanninum, at verja Elektron og harvið føroysk arbeiðspláss og føroyska vitan, eru hetta ósaklig atlit, ið hann tekur, ið einki hava við persónsvernd hins einstaka at gera. Tað margháttliga í hesum málið er, at Elektron metir seg kunna nýta avmarkaðu arbeiðsorku sína til aðrar átrokandi uppgávur enn hesa, ið teir kunnu útvega sær úr Danmark, og at stovnurin frábiðir sær hesa, eftir mínum tykki, politisku uppíblanding frá landsstýrismanninum.

Einasta atlitið, ið tykist vera hjá landsstýrismanninum, er tað partapolitiska, og er hetta sum kunnugt ikki eitt sakligt atlit at taka og ikki í tráð við endamálsorðingina í lógini. Embætisførslan hjá landsstýrismanninum minnir ikki sørt um tað, sum við einum donskum orði verður nevnt "magtfordrejning", og tað eigur Løgtingið ikki at kunna liva við.

Viðlagt fyrispurningingum er skriv frá P/F Elektron, sum stóð í Dimmalætting undir teiginum "Meining" mikudagin tann 30. oktober 2002 undir yvirskriftini "GjaldSkipanin lýkur øll krøv í verandi lóggávu".

Tí verða spurningarnir settir.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Med forlov

**Jørn Astrup Hansen**
*Formand for Elektrons bestyrelse*



Lov er lov, og lov skal holdes, udtaler landsstyremanden i lovanliggender, som mener, at P/F Elektrons samarbejde med PBS om et betalingsformidlingssystem ikke er foreneligt med lagtingslov om behandling af personoplysninger.

Heri er bestyrelsen for Elektron ikke enig. Helt efter loven ansøgte Elektron i øvrigt tidligere på året Dátueftirlitið om tilladelse til at sætte betalingsformidlingssystemet i værk. Dátueftirlitið, som lagtinget i loven har indsat som øverste myndighed på området, meddelte herefter i juni 2002 P/F Elektron den ansøgte tilladelse.

Som vi må forstå det, mener landsstyremanden, at Dátueftirlitið har læst lov om behandling af personoplysninger forkert. Det er en opfattelse, som Elektron ikke deler.

I andre retssamfund er det således, at hvis en borger finder, at en administrativ afgørelse er forkert, så kan han indanke afgørelsen for domstolene, som herefter tager stilling til, hvorvidt afgørelsen er lovmedholdelig.

Her på Færøerne kunne det forekomme at være således, at hvis landsstyremanden ikke bryder sig om en afgørelse lovligt truffet af rette myndighed, så skriver han blot en ny bekendtgørelse, som skal have virkning for den allerede trufne afgørelse.

Andre steder er det domstolene, som fortolker lovene og herefter skriver en dom, hvorefter alle haver sig at rette. Hos os er det landsstyremanden, der fortolker lovene og herefter skriver en (ny) bekendtgørelse, hvorefter alle ....

Det kan nok forekomme, at Montesquieu, der udviklede magtadskillelseslæren, har levet forgæves. For hvad skal der dog blive tilbage for den dømmende magt (domstolene) at tage sig til, hvis den udøvende magt (landsstyremanden) gør det til en vane med nye bekendtgørelser ikke blot at regulere, men også at omgøre, afgørelsen af enkeltsager? Og hvad skal den lovgivende magt (lagtinget) tage sig til, hvis landsstyremanden i stedet for at lægge et nyt lovforslag for tinget blot skriver nye bekendtgørelser?

Med en uhindret adgang for landsstyremanden til at skrive nye bekendtgørelser, efterhånden som han finder behov herfor, er der vel i øvrigt en fare for, at vi ad bagdøren - helt uden om lagtinget - kunne komme til at indføre særlove. Det er en uskik, som ikke hører sig til i fredstid.

Forløbet må give anledning til ikke blot undren, men også bekymring. Det må være således, at borgerne kan disponere i tillid til afgørelser truffet af rette myndighed. Det kan ikke være ret, at en landsstyremand med nye bekendtgørelser kan ændre grundlaget for dispositioner, som er truffet i tillid til gældende lovgivning og med tilladelse fra myndighederne.

Selvfølgelig skal Elektron overholde landets love. Men det skal landsstyremanden vel også.

# Onnur enn politikarar við á ferðini til ST

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður av ST-borgini í New York:*



Ymisku londini, sum hava fastan sess í ST, hava havt ta siðvenju, at umframt politikarar, hava eisini umboð fyri eitt nú arbeiðsgevarar, arbeiðarafakfeløg og onnur feløg verið við. - Kanska áttu vit føroyingar at viðgjørt eina broyting.

Sjálvandi verður ofta spurt, um neyðugt er, at tinglimir úr ymiskum londum, skulu vitja ST-borgina í New York, tinglimir, sum ikki beinleiðis umboða fasta sessin í ST- tinginum.

Hetta eru mál, sum av og á verða havd á lofti í limalondunum og av fjølmiðlunum í umboðandi londum.

Miðdepilin, Sameindu Tjóðir, hevur eisini onnur endamál enn at savna politikarar til orðaskifti, nevndarfundir, at taka lut í arbeiðnum í Trygdarráðnum, at tosa um menning av tilafturskomnum londum, eitt nú Afrika, viðgera álvarsemi av HIV/AIDS, og í felag við diplomatiskum virksemi at fáa frið í lag, har kríggj herjar og gera átøk at byggja uppaftur, tað ið lagt varð í oyði.

**YMISKIR FELAGSSKAPIR UMBOÐAÐIR**

Umboðini úr ymisku londunum, sum vitja í tvær, tríggjar og í fýra vikur, eru vanliga onnur enn politikarar, eisini eru tey mannað við umboðum úr eitt nú arbeiðgevara- og arbeiðarafakfeløg, feløg, ið viðgera mannarættindi, javnstøðu, ungdómsfeløg og ST-lokalar felagsskapir.

Uttan iva kundi verið áhugavert og av týdningi, at eisini føroyingar tóku hetta málið upp og kannaðu, um ikki hesir felagsskapir skiftust um at senda eitt umboð saman við politikarum til ST ársfundin.

**MØGLEIKI FYRI GÓÐUM SAMBONDUM**

Her høvdu verið møguleikar fyri, at okkara skiftandi umboð - umframt politikarar - fingu góð og áhugaverd sambond við lond og felagsskapir.

Í samband við teir fundir, døgverðar og tær resep- tionir, ið hava verið,

eri eg komin í prát við fleiri av hesum umboðum, eitt nú við umboð fyri arbeiðsgevarar og LO úr Danmark, Noregi og Svøriki, sum hava róst hesi siðvenju, sum nú hevur verið í fleiri ár, at teir eru við í sendinevndunum.

Hetta hevur givið teimum gyltar møguleikar fyri sambondum og dyggum samstørvum við ymisk lond.

**MIÐDEPIL FYRI SO MONGUM**

ST kann verða ein virðismikil miðdepil av stórum týdningi, um vit duga at brúka hesar møguleikar, har eitt fjølbroytt virksemi fer fram um allan heim og í øllum londum.

Her er peningaumfarið eisini viðfevnt.

Tí hevði kanska verið áhugavert at kanna møguleikarnar fyri eini broyttari skipan fyri samstarvinum við ársfundin hjá ST, sum hevur verið siðvenja hjá øðrum londum.

Hetta kundi møguliga givið føroyska samfelagnum størri virði í samstarvi við tey lond, ið hava fastan sess í Sameindu tjóðum.

# Tíðindabræv frá Brúkarasamtakinum

Mikukvøldið hin 30. oktober 2002 var stovnandi aðalfundur hjá Brúkarasamtakinum, felag fyri brúkarar í Føroyum.

Orsøkin til hetta tiltak var, at rættindi brúkarans í Føroyum ikki eru nóg væl vard, lutvís tí at myndugleikar í ov lítlan mun tykjast at hava brúkaraviðurskifti í huga.

Mett var tí neyðugt, at brúkararnir í Føroyum sjálvir taka seg saman í felagsskap við tí endamáli at bøta um viðurskiftini.

Ætlanin við samtakinum er fyrst og fremst at virka fyri almennum brúkarapolitikki við dagførdari lóggávu í Føroyum, umframt at gera vart við brúkarasjónarmið í dagliga orðaskiftinum.

Eisini er ynski, at Brúkarasamtakið á ein positivan hátt verður málgagn fyri brúkaraáhugamálum, tá ið hesi skulu berast fram í konstruktivum kjaki við politisku myndugleikarnar.

Á stovnandi aðalfundinum vóru viðtøkur brúkarasamtaksins samtyktar og vóru fimm nevndarlimir valdir. Hesir vóru Ingun Simonsen, Hans Pauli Strøm, Gunnleivur Dalsgarð, Høgni Debes Joensen og Kristina Samuelsen. Sum varalimur vóru vald Kate Sanderson og Edvin Joensen.

Nevndina hevur skipað seg við Ingun Simonsen sum forkvinnu, Hans Paula Strøm sum skrivara og Gunnleivi Dalsgarð sum kassameistara.

At enda skal verða nevnt, at talan er um sjálvbodnan felagsskap, at arbeiðið sum nevndarlimur er ólønt, og at virksemi ikki fevnir um persóns- ella einstaklingamál.

Longu á stovningarfundinum vóru einir 30 einstaklingar og 5 av teim størstu fakfeløgunum, ið teknaðu seg sum lim í Brúkarasamtakinum.

Limagjaldið er sett til 100 kr. um árið - tað sama bæði fyri einstaklingar og feløg.

Tað fer sjálvandi at styrkja virkið hjá samtakinum almikið, at so nógvir einstaklingar, feløg og stovnar sum møguligt eru við í felagnum, og verður tí heitt á hesi um at tekna seg sum limir.

Limir kunnu tekna seg á hesi adressu:
Brúkarasamtakið,
Postsmoga 165,
110 Tórshavn,

ella við at venda sær til ein av nevndarlimunum:

Ingunn Simonsen, tlf 317782/211696,
t-postur: ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, tlf 424044/221919,
t-postur: hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, tlf 314868/311210,
t-postur: gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, tlf 311832, t-postur: foe@foe.eli.dk
Kristina Samuelsen, tlf 311883/211883,
t-postur: kris@logting.fo

Samtakið er óheft av øllum partapolitikki, eins og tað er óheft av fíggjarligum ella øðrum seráhugamálum, men harafturímóti sum eitt aðalmál hevur eitt gott samstarv við feløg, politikkarar og stovnar. Hóast sjónarmið kunnu verða ymisk, so ynskir samtakið at skifta orð um slík í einum góðum anda.

# Leiðarastevna fyri leiðarar í dagstovnum

TÍÐINDASKRIV

4. og 5. november 2002 hittast leiðarar í dagstovnum í Føroyum til stevnu á Hotel Føroyum, har vit viðgera ymisk evnir, sum hava við leiðslu at gera.

Ein av hesum spurningum er: Hvussu fáa vit nøkta tørvin á pedagogum? Soleiðis sum gongdin er í dag, er ikki nóg mikið við einum flokki av pedagogum frá Føroya Læraraskúla um árið.

Ynskja tit at vita meira ella at taka henda spurning upp í sending tykkara, eru tit vælkomin at venda tykkum til undirritaðu á tlf. 225222.